# Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 28

ISSN 0907-905X


Nr. 95 11. juli 2011

**Kunngerð**
**um**
**tryggingarmekling**

Við heimild í § 42, stk. 2 og § 215, stk. 2 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi verður ásett:

*Øki og allýsing*

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri vinnuligt tryggingarmeklaravirksemi.

*Stk. 2.* Tryggingarmekling, sbrt. § 2, kann útinnast av partafeløgum, smápartafeløgum, íognarfeløgum, einstaklingavirkjum og tílíkum.

**§ 2.** Við tryggingarmeklaravirksemi í hesi kunngerð er at skilja:

Tað virksemi, sum stendst av at veita kundum ráðgeving, grundað á greining av so nógvum tøkum tryggingarloysnum sum gjørligt, og tað virksemi, sum stendst av at vísa kundanum á tryggingarloysnir frá einum ella fleiri tryggingarfeløgum, uttan at greið avtala er gjørd um hetta við tryggingarfeløgini. Talan kann eisini verða um at umsita tryggingaravtalur vegna kundan, serliga tá ið tað snýr seg um skaðatilburðir.

**§ 3.** Kunngerðin er ikki galdandi:

1) fyri miðlan av tryggingum, sum verður útint av tryggingarfeløgum, ella av starvsfólkum í hesum feløgum,
2) tá ið eitt virki stundum ráðgevur um trygging í sambandi við annað vinnuligt virksemi, og høvuðsendamálið við ráðgevingini ikki er at hjálpa kundanum við at leggja fram, mæla til, vera partur av ella gera tað innleiðandi arbeiðið í sambandi við gerð av eini tryggingaravtalu.
3) tá ið eitt virki bara gevur vanligar upplýsingar um tryggingarvørur ella setir seg í samband við tryggingarfeløg, og endamálið ikki er at hjálpa kundanum við at leggja fram, mæla til, vera partur av ella gera tað innleiðandi arbeiðið í sambandi við gerð av eini tryggingaravtalu, ella
4) tá ið eitt virki hevur um hendur umsitingina hjá einum tryggingarfelagi av skaðatilburðum, virðismetingum, fráboðaðum endurgjaldskrøvum í sambandi við skaða ella aðrar líknandi uppgávur vegna tryggingarfelagið.

*Stk. 2.* Kunngerðin er ikki galdandi fyri miðlan av tryggingarvørum, sum lúka allar hesar treytir:
1) Tryggingaravtalan krevur bara kunnleika til tann tryggingarfulnað, sum verður boðin.
2) Tryggingaravtalan er ikki ein lívstryggingaravtala.
3) Tryggingaravtalan fevnir ikki um ábyrgdartrygging.
4) Viðkomandi likamligi ella løgfrøðiligi persónur hevur ikki tryggingarmekling sum høvuðsvinnu.
5) Tryggingaravtalan er eitt ískoyti til ta vøru ella tænastuveiting, sum verður veitt av einum ávísum veitara, um so er at tryggingaravtalan veitir fulnað fyri:
   a) váða fyri rakstrarmistak, tap ella skaða á vørur, veittar av viðkomandi veitara ella
   b) tap ella skaða á viðføri og annar váði, knýttur at eini ferð, sum er bíløgd hjá viðkomandi veitara, uttan mun til um tryggingaravtalan fevnir um lívs- ella ábyrgdartrygging, treytað av at fulnaðurin er tilknýttur (accessoriskur) í mun til høvuðsfulnaðin fyri váða knýttan at hesi ferð.
6) Ársgjaldið fyri tryggingaravtaluna fer ikki upp um 500 evrur.
7) Longdin á tryggingaravtaluni, íroknað leinging, fer ikki upp um 5 ár.

*Skráseting av tryggingarmeklaravirkjum og tryggingarmeklarum*

**§ 4.** Feløg, sum útinna tryggingarmeklaravirksemi, skulu vera skrásett hjá Tryggingareftirlitinum.
*Stk. 2.* Ein persónur, ið útinnir tryggingarmekling, sum starvsfólk hjá einum virki, fevnt av stk. 1, skal vera skrásettur hjá Tryggingareftirlitinum til at útinna tryggingarmekling, sum starvsfólk hjá virkinum.

**§ 5.** Tryggingareftirlitið skrásetir eitt virki í felagformi, tá ið:
1) nevndar- og stjórnarlimir hjá umsøkjara lúka treytirnar í § 8, stk. 1,
2) tann ella tey, sum hava ábyrgd av tryggingarmeklingini, lúka treytirnar í § 8, stk. 1, og § 9, stk. 1,
3) virkið hevur teknað eina virkisábyrgdartrygging, sbr. stk. 2 og 3 og
4) persónar starvast í virkinum, sum hava ella samstundis søkja um at vera skrásettir til at útinna tryggingarmekling sum starvsfólk, sbrt. § 7.

*Stk. 2.* Tryggingarkrøv ímóti tryggingarmeklaravirki kann kann verða sett beinleiðis móti tí tryggingarfelagið, har tryggingarmeklaravirkið er tryggjað.
*Stk. 3.* Tryggingareftirlitið ásetir reglur um økið og slag av virkisábyrgdartryggingini og tíðarskeiðið sum tryggingin varir
*Stk. 4.* Ein umsókn um skráseting, sbrt. stk. 1 skal innihalda tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at Tryggingareftirlitið kann meta, um treytirnar í stk. 1 eru loknar. Umframt hetta skal í umsóknini eisini verða upplýst um:
1) hvat slag av tryggingarmekling virkið ætlar at útinna, og hvønn felagsform virkið hevur,
2) nøvn á fæfeingisognarum í virkinum umframt fæfeingisognarlutin í virkinum ella atkvøðurættindi og
3) fæfeingisognarlutin ella atkvøðurættindi hjá virkinum í einum ella fleiri tryggingarfeløgum, umframt navn ella nøvn á hesum feløgum.

**§ 6.** Tryggingareftirlitið skrásetir ein persón til at útinna tryggingarmekling í einstaklingavirki (firma), tá ið:
1) umsøkjarin lýkur treytirnar í § 8 stk. 1,
2) umsøkjarin lýkur ásettu krøvini um ástøðiliga útbúgving og verkligan kunnleika til tryggingarmeklaravirksemi, sbrt. § 9, stk. 2, og
3) virkið hevur teknað vinnuábyrgdartrygging.

*Stk. 2.* Ein umsókn um skráseting, sbrt. stk. 1 skal innihalda tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at Tryggingareftirlitið kann meta, um treytirnar í stk. 1 eru loknar. Umframt hetta skal í umsóknini eisini verða upplýst um:
1) hvat slag av tryggingarmekling virkið ætlar at útinna,
2) fæfeingisognarlutin ella atkvøðurættindi hjá virkinum í einum ella fleiri tryggingarfeløgum, umframt navn ella nøvn á hesum feløgum.

**§ 7.** Tryggingareftirlitið skrásetir ein persón, ið útinnir tryggingarmekling sum starvsfólk í einum tryggingarmeklaravirki, tá ið:
1) umsøkjarin lýkur treytirnar í § 8, stk. 1, og
2) umsøkjarin lýkur ásettu krøvini um kunnleika til tryggingarmeklaravirksemi, sbrt. § 9, stk. 2.

*Stk. 2.* Ein umsókn um skráseting, sbrt. stk. 1 skal innihalda tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at Tryggingareftirlitið kann meta, um treytirnar í stk. 1 eru loknar. Umframt hetta skal í umsóknin eisini verða upplýst um, hvat slag av tryggingarmekling persónurin ætlar sær at útinna.

**§ 8.** Nevndar- og stjórnarlimir hjá umsøkjara skulu hava nøktandi royndir til at útinna starvið ella uppgávuna sum ávikavist nevndarlimur og stjóri í virkinum.
*Stk. 2.* Persónsskarin, sum er fevndur av §§ 5-7, kann ikki útinna starvið ella uppgávuna í einum tryggingarmeklaravirki, um:
1) viðkomandi verður dømdur revsing fyri brot á revsilógina ella fíggjarligu lóggávuna, og hetta brot hevur við sær, at vandi er fyri, at starvið ella uppgávan ikki verður røkt á trygdargóðan hátt,
2) viðkomandi hevur fráboðað gjaldsteðg, er farin á húsagang, hevur latið inn umsókn um skuldarumskipan ella samráðingar um neyðskuldarsemju eru byrjaðar, ella
3) viðkomandi hevur sýnt slíkan atburð, at orsøk er til at halda, at hann ikki kann røkja starvið ella uppgávuna á fullgóðan hátt.

*Stk. 3.* Persónsskarin, sum er fevndur av stk. 2, hevur

skyldu til at lata Tryggingareftirlitinum upplýsingar um tey í stk. 1 og 2 nevndu viðurskifti.

**§ 9.** Tann ella teir persónar í virkinum, sum hava ábyrgd av tryggingarmeklingini, skulu hava eina almenna vitan um tryggingarmekling.
*Stk. 2.* Persónar, ið søkja um skráseting sum tryggingarmeklarar, skulu hava almenna vitan um og verkligan kunnleika til tryggingarmeklaravirksemi.

**§ 10.** Tá ið Tryggingareftirlitið hevur givið einum tryggingarmeklaravirki ella starvsettum tryggingarmeklara í virkinum fráboðan um skráseting, sbrt. § 4 til at útinna tryggingarmeklaravirksemi, verða tryggingarmeklaravirkið, ábyrgdarpersónur ella persónar fyri tryggingarmeklingini í virkinum og tann ella teir starvsettu tryggingarmeklararnir skrásett í skránni yvir tryggingarmeklarar hjá Tryggingareftirlitinum. Skráin er atkomulig hjá almenninginum.

**§ 11.** Tryggingarmeklaravirki, sum hava fingið loyvi frá Tryggingareftirlitinum at verða skrásett, skulu nýta heiti „tryggingarmeklari“ ella „skrásettur tryggingarmeklari“ í navninum. Ein persónur, ið frá Tryggingareftirlitinum hevur fingið loyvi at virka sum tryggingarmeklari, skal nýta heiti „tryggingarmeklari“ ella „skrásettur tryggingarmeklari“, tá hann útinnir tryggingarmeklaravirksemi.
*Stk. 2.* Onnur virki og persónar kunnu ikki nýta nøvn ella heiti fyri teirra virksemi, sum kunnu geva einum ta fatan, at tey eru tryggingarmeklaravirkir ella starvsettir tryggingarmeklarar.

**§ 12.** Tryggingarmeklaravirksemi skal rekast samsvarandi reiðiligum handilsskikki og góðari siðvenju innan virkisøkið.

**§ 13.** Eitt tryggingarmeklaravirki kann útinna annað virksemi. Fyri hetta virksemið skal nýtast eitt heiti, sum ikki kann misfatast fyri tryggingarmeklaravirkið.

**§ 14**. Eitt tryggingarmeklaravirki umboðar bara kundan.
*Stk. 2.* Eitt tryggingarmeklaravirki má ikki beinleiðis ella óbeinleiðis hava tilknýti til eitt tryggingarfelag, ið kann skapa iva um, hvørt tryggingarmeklaravirkið er óheft av áhugamálum hjá tryggingarfeløgum, sum ikki eru ein fylgja av innanhýsis ognarviðurskiftum í virkjunum.
*Stk. 3.* Ein starvsettur tryggingarmeklari má ikki gjøgnum starvsetan ella á annan hátt hava tilknýti til tryggingarfeløg ella hartil hoyrandi samtøkufeløg sum gera, at meklarin er bundin at áhugamálunum hjá tryggingarfeløgum.

*Skráseting, sum kann takast aftur ella fella burtur*

**§ 15.** Tryggingareftirlitið tekur aftur skrásetingina hjá einum tryggingarmeklaravirki, um:

1) virkið biður um hetta,
2) ábyrgdartrygging ikki longur er teknað,
3) tryggingarmeklaravirkið ger seg sekan í grovum ella endurtiknum brotum á ásetingarnar í hesi kunngerð,
4) tryggingarmeklaravirkið ikki longur lýkur treytirnar í § 8, stk. 2,
5) tryggingarmeklaravirksemi ikki er byrjað í seinasta lagi 12 mánaðir eftir, at Tryggingareftirlitið hevur givið fráboðan um skráseting, ella
6) tryggingarmeklaravirksemi ikki verður útint í einum tíðarskeiði, sum er longri enn 12 mánaðir.

*Stk. 2* Tryggingareftirlitið tekur aftur skrásetingina hjá einum starvsettum tryggingarmeklara, um:

1) tryggingarmeklarin biður um hetta,
2) tryggingarmeklarin ger seg sekan í grovum ella endurtiknum brotum á ásetingarnar í hesi kunngerð,
3) tryggingarmeklarin ikki longur lýkur treytirnar í § 8, stk. 2.

*Stk. 3.* Afturtøka av skrásetingini, sbrt. stk. 2 kann varða í eitt tíðarskeið frá 1 til 5 ár ella inntil annað verður avgjørt. Eftir hetta kann tryggingarmeklarin verða skrásettur av nýggjum treytað av, at starvsetti tryggingarmeklarin lýkur treytirnar í § 8, stk. 2.

**§ 16.** Skráseting hjá einum tryggingarmeklaravirki fellur burtur, um virkið verður koyrt á húsagang ella virksemið á annan hátt heldur uppat.
*Stk. 2.* Skráseting av einum starvsettum tryggingarmeklara fellur burtur, tá ið viðkomandi doyr.

**§ 17.** Um Tryggingareftirlitið hevur tikið aftur skrásetingina hjá einum tryggingarmeklaravirki ella skrásetingin er fallin burtur, fellur skrásetingin hjá tí starvsetta tryggingarmeklaranum samstundis burtur, um viðkomandi ikki beinanvegin fær starv sum tryggingarmeklari aðrastaðni ella viðkomandi hevur biðið um at fáa skrásetingina latna í varðveitslu, sbrt. stk. 2.
*Stk. 2.* Ein tryggingarmeklari kann lata skráseting sína sum starvsettur tryggingarmeklari í varðveitslu. Skrásetingin kann fáast av nýggjum, treytað av, at tryggingarmeklarin lýkur treytirnar í § 6 ella starvsetti tryggingarmeklarin lýkur treytirnar í § 7.

**§ 18.** Tá ið skráseting av tryggingarmeklaravirki er tikin aftur ella fallin burtur, skal tryggingarmeklaravirksemið halda uppat. Farast má ikki undir annað virksemi áðrenn tryggingarmeklaravirksemi er endað.
*Stk. 2.* Tá ið skráseting av einum tryggingarmeklaravirki ella einum starvsettum tryggingarmeklara er tikin aftur ella fallin burtur, verður viðkomandi tryggingarmeklaravirki ella starvsetti tryggingarmeklari strikaður úr skránni yvir tryggingarmeklarar hjá Tryggingareftirlitinum.

*Eftirlit*

**§ 19.** Tryggingareftirlitið ansar eftir, at reglurnar í hesi kunngerð verða hildnar.

*Stk. 2.* Tryggingareftirlitið kann geva boð um at rætta viðurskifti, sum eru í ósamsvari við § 12.

**§ 20.** Tryggingarmeklaravirki og starvsettir tryggingarmeklarar skulu eftir áheitan geva Tryggingareftirlitinum tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri virksemi hjá eftirlitinum.
*Stk. 2.* Tryggingareftirlitið kann harumframt krevja likamligum ella løgfrøðiligum persónum eftir øllum upplýsingum, sum eru neyðugar fyri at eftirlitið kann meta, um virksemi teirra er fevnt av ásetingunum í kunngerðini.

*Kæra*

**§ 21.** Avgerðir tiknar av Tryggingareftirlitinum sambært kunngerðini, kunnu av tí, sum avgerðin viðvíkur, kærast til Vinnukærunevndina í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.
*Stk. 2.* Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum um afturtøku, sbrt. § 15, stk. 1, nr. 1, 2 og 5 og stk. 2, nr. 1 kunnu ikki kærast til Vinnukærunevndina.

*Revsing*

**§ 22.** Brot á ásetingarnar í § 4, § 5, stk. 1, nr. 3 og stk. 2 og § 11, stk. 1 og 2, verða revsað við bót, uttan so, at harðari revsing er ásett í aðrari lóggávu. Eitt tryggingarmeklaravirki, sum ikki aktar boð, ið verða givin, sbrt. § 18, stk. 2 verður revsað við bót.
*Stk. 2.* Feløg o.a. (løgfrøðiligir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd eftir reglunum í kapittul 5 í revsilógini.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 23.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2011.
*Stk. 2.* Tryggingarmeklarar, sum virka á føroyska marknaðinum, skulu lúka treytirnar í hesi kunngerð innan 1. desember 2011.

Vinnumálaráðið, 11. juli 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 96 11. juli 2011

# Kunngerð
# um
# starvsfólk at hava ábyrgd av klagum í tryggingarfeløgum

Við heimild í § 35, stk. 2, og § 215, stk. 2 og stk. 3 í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi verður ásett:

*Øki*

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri tryggingarfeløg, ið reka beinleiðis tryggingarvirksemi í Føroyum, og sum hava privatar kundar.

*Stk. 2.* Tryggingarfeløg í hesi kunngerð eru at skilja sum:

1) Beinleiðis teknandi skaðatryggingarfeløg (partafeløg og sínámillum feløg) sum hava viðtøkuheimstað í Føroyum.
2) Lívstryggingarfeløg (partafeløg og sínámillum feløg), sum hava viðtøkuheimstað í Føroyum.
3) Tvørgangandi eftirlønargrunnar, sum hava viðtøkuheimstað í Føroyum.
4) „Firma"eftirlønargrunnar, sum hava viðtøkuheimstað í Føroyum.
5) Deildir hjá útlendskum skaðatryggingarfeløgum, sum hava fingið loyvi í einum landi uttanfyri Evropasamveldið, sum samveldið ikki hevur gjørt sáttmála við á fíggjarøkinum.
6) Deildir hjá útlendskum lívstryggingarfeløgum, sum hava fingið loyvi í einum landi uttanfyri Evropasamveldið, sum samveldið ikki hevur gjørt sáttmála við á fíggjarøkinum.

*Stk. 3.* Kunngerðin er galdandi fyri privat kundaviðurskifti og vinnulig kundaviðurskifti, í tann mun hesi ikki avgerandi líkjast frá privatum kundaviðurskiftum.

*Almennar reglur um ábyrgdarstarvsfólkið*

**§ 2.** Tryggingarfeløg, sum eru nevnd í § 1, stk. 2, skulu tilnevna eitt starvsfólk at hava ábyrgd av klagum.

*Stk. 2.* Við starvsfólk, ið hevur ábyrgd av klagum, skal skiljast ein persónur ella fyriskipanarlig eind, ið hevur ábyrgd av klaguviðgerðini innanhýsis í felagnum.

*Stk. 3.* Við klagu skal skiljast ein áheitan frá kunda, sum eftir at hava umrøtt trupulleikan við tryggingarfelagið framvegis ikki er samdur í viðgerðini hjá felagnum ella úrslitinum og tí vil hava málið lagt fyri starvsfólkið, ið hevur ábyrgd av klagum.

**§ 3.** Tryggingarfelagið skal upplýsa kundan um, hvør hevur ábyrgd av klagum, undir hesum hvar og hvussu kundin kann venda sær til viðkomandi. Upplýsingarnar skulu vera til taks á handilsstaðnum og á møguligari heimasíðu hjá felagnum.

*Eftirlit og revsing*

**§ 4.** Tryggingareftirlitið kann, sbr. § 194 í løgtingslóg um tryggingarvirksemi, geva boð um at rætta viðurskifti, ið eru í ósamsvari við § 2, stk. 1 og § 3.

**§ 5.** Við bót verður tann revsaður, ið ikki aktar boð sambært § 4.

*Stk. 2.* Feløg o.a. (løgfrøðiligir persónar) kunnu áleggjast revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. september 2011.

Vinnumálaráðið, 11. juli 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 97 12. juli 2011

**Kunngerð**
**um**
**árliga skúladagatalið í fólkaskúlanum**

Við heimild í § 18, stk. 1 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan verður ásett:

**§ 1.** Árliga skúladagatalið í fólkaskúlanum er 198 dagar.
*Stk. 2.* Skúlaárini 2011/12 og 2012/13 verður árliga skúladagatalið í fólkaskúlanum tó lækkað við til samans 5 skúladøgum.
*Stk. 3.* Skúladagatalið skúlaárini 2011/12 og 2012/13 lækkar við ávikavist 2 og 3 døgum í mun til, um lærararnir í einstaka skúlanum fara á skeið í fakligari lesing ella kunningartøkni.
*Stk. 4.* Skúlaárini 2011/12 og 2012/13 nýta skúlarnir 2 dagar til fakliga lesing og 3 dagar til kunningartøkni.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 140 frá 13. september 1995 um árliga talið av skúladøgum í fólkaskúlanum.

Mentamálaráðið, 12. juli 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 98 12. juli 2011

# Kunngerð
# um
# kærunevnd at viðgera avgerðir yrkisnevndarinnar

Við heimild í § 23, stk. 5 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 17. mai 2011, verður ásett:

**§ 1.** Kærunevndin viðger og tekur støðu til kærur um avgerðir tiknar av yrkisnevndini.

**§ 2.** Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin, sum er fastur limur í nevndini. Formaðurin skal verða løgfrøðingur og verða tilnevndur fyri eitt 4 ár skeið. Á sama hátt tilnevnir landsstýrismaðurin ein varalim fyri formannin.
*Stk. 2.* Í seinasta lagi 4 vikur eftir, at kæra er móttikin, tilnevnir formaðurin eitt arbeiðsgevaraumboð og eitt løntakaraumboð í nevndina eftir tilmæli frá avvarðandi yrkisfeløgum.

**§ 3.** Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, kærarin fær skrivliga fráboðan um avgerð yrkisnevndarinnar.

**§ 4.** Formaðurin boðar nevndarlimunum til fundar. Nevndin er viðtøkuføR, tá ið allir limirnir eru møttir. Avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

**§ 5.** Kærunevndin skal miða eftir at taka avgerð innan 4 vikur, eftir at allir tørvandi upplýsingar í málinum eru nevndini í hendi.
*Stk. 2.* Kærarin skal hava skrivlig boð um avgerðina innan 8 dagar eftir, at hon er tikin.
*Stk. 3.* Avgerð tikin av kærunevndini er endalig innan fyrisitingina.

**§ 6.** Landskassin rindar útreiðslurnar av virkseminum hjá kærunevndini.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer kunngerð nr. 87 frá 15. mai 2001 um kærunevnd í sambandi við góðkenning av virkjum sum læarupláss, sum broytt við kunngerð nr. 119 frá 24. august 2001 úr gildi.

Mentamálaráðið, 12. juli 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 99 12. juli 2011

**Kunngerð**
**um**
**lærusáttmálar, umsitingargjald o.a.**

Við heimild í § 22, stk. 10 og § 31, stk. 3 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 17. mai 2011, verður ásett:

**§ 1.** Yrkisdepilin, sum fyrisitur ráðsskipanina hjá Yrkisútbúgvingarráðnum, veitir sáttmálapørtunum hjálp og ráðgeving í sambandi við, at lærusáttmáli verður undirskrivaður, og tá ið læripláss skal innskriva lærling til skúlagongd.

**§ 2.** Læruplássið skal senda undirskrivaða lærusáttmálan til Yrkisdepilin til góðkenningar.
*Stk. 2.* Lærusáttmálin fær gildi frá tí degi, hann er góðkendur av góðkenningarmyndugleikanum.

**§ 3.** Yrkisdepilin eftirkannar, um fyritreytirnar fyri lærusáttmálanum eru í lagi, herundir um:
1) Lærlingurin hevur fylgt undirvísingini til fráfaringarroynd fólkaskúlans,
2) læruplássið lýkur treytirnar fyri góðkenning,
3) lærusáttmálin fatar um alla verkligu læruna og øll skúlaskeiðini umframt møguliga yrkis- / sveinaroynd,
4) tað í lærusáttmálanum er tilskilað, um talan eisini er um eina útisetaavtalu,
5) lærusáttmálin inniheldur møguliga tilskilan um frítøku fyri partar av læruni,
6) serligar lærusáttmálatreytir hava heimild í góðkenning frá avvarðandi yrkisnevnd og møguligum verja, herundir broyting av lærusáttmálanum,
7) lærusáttmálin er í samsvari við ta til eina og hvørja tíð galdandi ásetingar um lønar- og arbeiðsviðurskifti,
8) navnið, vinnutalið og heimstaðurin hjá læruplássinum, umframt navnið, bústaðurin og føðingardagurin hjá lærlinginum, eru røtt, og
9) at lærusáttmálin er í samsvari við ásetingarnar í viðkomandi útbúgvingarkunngerð.

**§ 4.** Lærupláss gjalda Landskassanum kr. 3.000,- fyri hvønn góðkendan lærusáttmála.
*Stk. 2.* Umsitingargjaldið verður goldið umvegis Føroya Gjaldstovu.

**§ 5.** Yrkisdepilin góðkennir og skrásetir eftirkannaða lærusáttmálan.
*Stk. 2.* Tá ið Yrkisdepilin hevur góðkent lærusáttmálan, og umsitingargjaldið er goldið, verður lærusáttmálin skrásettur, og avrit av lærusáttmálanum útflýggjaður sáttmálapørtunum. Frumritið er í varðveitslu hjá Yrkisdeplinum.
*Stk. 3.* Tá ið lærupláss frá Yrkisdeplinum hevur móttikið góðkenda lærusáttmálan, skal læruplássið innskriva lærlingin til góðkendan yrkisskúla.
*Stk. 4.* Skúlin, sum lærlingurin skal verða tikin inn á, skal í seinasta lagi 4 vikur, áðrenn nýtt skúlaskeið byrjar, senda lærlinginum og læruplássinum boð um, nær skeiðið byrjar, og hvussu leingi, skeiðið varar.

**§ 6.** Umsókn um broytingar í lærusáttmálanum, eisini stytting ella leingjan av lærutíðini, uppsøgn av lærusáttmálanum, umframt aðrar møguligar broytingar, skulu skrivast á serligt skjal, ið sáttmálapartarnir, sum varða av broytingunum, undirskriva.
*Stk. 2.* Yrkisdepilin eftirkannar, um fyritreytirnar fyri broytingunum í lærusáttmálanum eru í lagi og góðkennir og skrásetir eftirkannaða lærusáttmálan við góðkendu broytingunum.
*Stk. 3.* Tá ið Yrkisdepilin hevur góðkent og skrásett broytingarnar í lærusáttmálanum, verður eitt avrit av broytta lærusáttmálanum sendur sáttmálapørtunum og viðkomandi skúla.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer kunngerð nr. 101 frá 18. juni 2001 um lærusáttmálar o.a. og kunngerð nr. 73 frá 8. august 2002 um umsitingargjald vinnunar úr gildi.

Mentamálaráðið, 12. juli 2011

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705